# á missiónsviku í Tabor

## 12.–19. februar 2017




1. Hjá Jesusi fann eg tann friðin,
eg leitaði eftir mong ár.
Mær longdist, eg bað, og eg spurdi
um vegin, - og feldi mangt tár;
eg las, og eg las í Guds orði,
eg las um tað lívsins breyð,
og ongan tú stoytir burt frá tær,
ið kemur til tín í neyð.

*Eg var vónbrotin, troytt og mær longdist*
*at finna frið við tín kross,*
*og tú vísti mær vegin – eg trúgvi.*
*Hjá tær eg nú eigi eitt pláss.*

2. Tá sá eg tann krossfesta Jesus,
hann hekk har og bløddi for meg,
og tað var, sum ein rødd við meg segði:
"Alt hetta eg gjørdi for teg".
Mítt hjarta tá fyltist við gleði,
tú syndir mínar burt tók.
Mítt navn, ja, mítt navn tað er skrivað,
ja, skrivað í lívsins bók.

3. Hjá Jesusi fann eg tann friðin,
sum halda kann í lívsins stríð.
Hjá Jesusi, eina hjá honum
ein mannasál verða kann frí.
Hjá Jesusi fann eg tað gleði,
ið heldur á lívsins leið,
um sorgir og trongdir meg níva,
í hansara fótspor eg steig.

*Gunhild Waag.*
*Lag: LM. 59. G-dur, d*
*nr. 456 í Missiónssangbókini*

# Vælkomin

**Sunnudagin 12. februar**
**Kl. 17. 00 Familjumøti,** Ólavur Magnusen talar
Barnakórið syngur
*Innsavnan til sunnudagsskúlan*
*Nátturði*

**Mánadagin 13. februar**
**Kl. 19.30 Møti,** Ovi Brim, prestur talar
Kirkjukórið syngur
*Innsavnan til Tabor*

**Týsdagin 14. februar**
**Kl. 19.30 Møti,** John Petersen talar
Menn úr Rituvík syngja

**Mikudag 15. februar**
**kl. 19.30 Møti,** Marjan Nielsen talar
Solo Gratia syngur

**Hósdagin 16. februar**
**kl. 19.30 Møti,** Jógvan Steintún talar
Gøtu kirkju ungdómskór syngur

**Fríggjadagin 17. februar**
**Kl. 19.30 Møti,** Øssur Kjølbro, aðalskrivari talar
Evni: Hvussu kenni eg Guds kall?
Todos syngur

**Leygardagin 18. februar**
**Kl. 10.00 Morgunmatur, bíbliutími,** Bergur D. Joensen, prestur talar

**Kl. 16.00 Barnamøti,** Pól Sondum talar
Børnini fáa okkurt gott aftaná

**Kl. 19.30 Møti,** Øssur Kjølbro, aðalskrivari talar
Evni: Frelsuvissa
Sangur: Ungar sangkreftir

**Kl. 22.00 Lovsangsløta,** við teimum ungu

**Sunndagin 19. februar**
**Kl. 11.00 Guðstænasta** við altargongd í Fríðrikskirkjuni
v/ Ova Brim, presti

**Kl. 15.00 Sunnudagsskúli,** Kaj Eli Hansen talar
Børnini fáa okkurt gott aftaná

**Kl. 19.00 Møti,** Øssur Kjølbro, aðalskrivari talar
Evni: Varðveitsla í lívinum saman við Jesusi
Taborkórið syngur
*Innsavnan til Heimamissiónina*

- Frá mánadegnum til fríggjadagin verður bønarløta í loftstovuni kl. 7.00 á morgni.
- Hvørt kvøld verður bønarløta í loftstovuni hálvan tíma áðrenn møtið.
- Aftaná møtini verður drekka í kjallaranum.
- Barnaansing fyri børnum undir skúlaaldri frá mánadegnum, fyri børnum í skúlaaldri frá fríggjadegnum.
- Bókasøla verður undir missiónsvikuni.

**Hjartaliga vælkomin til møtini!**